















*Hertil og ikki longur. Rúsdrekkalógin er væl tjóðrað fer ikki at flyta seg, so leingi verandi samgonga situr við stjórnarvaldinum í Føroyum.*

*Modelmynd: Álvur Haraldsen*

# Jenis hevur rúsdrekka-lógina í tjóðri

**Tað verður ikki undir sitandi samgongu, at rúsdrekkalógin verður broytt, soleiðis at skeinkiloyvi kunnu gevast til einstøk almenn tiltøk. Einsamalli tingmaðurin hjá Miðflokkinum er ikki fyri einari slíkari broyting, og hann vikast ikki**

SKEINKILOYVI
*Rúnar Reistrup*

Rúsdrekkalógin er væl tjóðrað og fer ikki at flyta seg, so leingi verandi samgonga situr við stjórnarvaldinum í Føroyum.

Tað ger Jenis av Rana, einasti maður á tingi fyri Miðflokkin og tungan á samgonguvágskálini, púra greitt.

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, royndi fyrr í ár at leggja eitt broytingaruppskot fyri tingið, sum skuldi gera tað møguligt hjá einstøkum tiltøkum at fáa skeinkiloyvi. Soleiðis kundi Norrøna sambært uppskotnu broytingunum fingið skeinkiloyvi í nakrar dagar, nú hon virkar sum hotelskip fyri Fish Fair stevnuna. Men broytingaruppskotið varð broytt eftir kravi frá Miðflokkinum.

## Gummiparagraffur

- Vit í Miðflokkinum sóu ætlaðu broytingina sum eina leysgeving av rúsdrekkalógini, og tað fer Miðflokkurin ongantíð at ganga við til, sigur Jenis av Rana. Eftir hansara tykki innihelt ætlaða broytingin ein gummiparagraff um, at skeinkiloyvi kundu flytast frá einum stað til eitt annað í avmarkaða tíð, sum sambært formanni Miðfloksins kundi verið misnýttur og hevði verið misnýttur um so var, at broytingin bleiv samtykt.

- Vit vita at alt, sum kann misnýtast verður misnýtt og handan lógarbroytingin hevði í roynd og veru givið alt púra leyst. Tað hevði blivið ein vinnuvegur at leiga skeinkiloyvir út, og tá hevði eingin avmarking verið longur, sigur Jenis av Rana.

## Føtur í spenn

Eingin avmarking á hvør kann fáa skeinkiloyvi ljóðar sum søtur tónleikur í oyrunum á nøkrum, men ikki í oyrunum hjá Jenisi og hinum í Miðflokkinum.

- Rúsdrekka oyðileggur samfelagið meira enn nakar droymir um. Tað drepur, sindrar familjur og ger fólk sjúk, sigur Jenis av Rana.

Tí er tað eitt hjartamál hjá honum og flokkinum, at tað ikki skal gerast lættari hjá fólki at fáa hendur á rúsdrekka. Og hetta hjartamál er hann til reiðar at stríðast fyri. Eisini um tað kostar politisk samstørv.

- Vit eru komnir í samgongu fyri at gera okkara ávirkan galdandi, har vit kunnu. Vit kunnu ikki fremja tær broytingar í rúsdrekkalógini, sum vit ynskja, tí tað eru vit ov smáir til. Men vit kunnu forða fyri leysgeving av lógini, og so leingi vit sita í samgongu, verður eingin lógarbroyting framd, sum ger tað lættari at fáa hendur á rúsdrekka. So einfalt er tað, sigur Jenis av Rana.

## Samgongufund um rúsdrekka

Sama boðskap gav hann eisini løgmanni í einum brævi, eftir at vinnumálaráðharrin hevði sent sítt broytingaruppskot til hoyringar hjá teimum fýra samgongufloklkunum.

Tað fekk løgmann at kalla inn til samgongufund um ætlaðu broytingarnar í rúsdrekkalógini. Úrslitið av fundinum var, at broytingaruppskotið varð broytt, soleiðis at tann parturin, sum heimilaði skeinkiloyvishavara at standa fyri skeinkingini til støk tiltøk sum størri samkomur, ráðstevnur, veitslur og líknandi, varð tikin úr broytingini. Eftir í uppskotinum vóru tá bert lógartekniskar broytingar.

## Ódramatiskt

Søgur ganga um, at hesin samgongufundurin var rættiliga dramatiskur, men sambært Jenisi av Rana var tað øvugt.

- Fundurin var púra ódramatiskur. Eg segði sum var, at hatta kundi Miðflokkurin undir ongum umstøðum ganga við til, og tað varð tikið til eftirtektar, sigur Jenis av Rana, sum tó ikki dylir fyri, at tað helst hevði verið ein onnur søga, um støða Miðfloksins ikki var tikin til eftirtektar av samgongufeløgunum..

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, segði við Sosialin í gjár, at hann mátti bara staðfesta, at broytingaruppskotið ikki vann frama í samgonguni og legði afturat, at løgmaður segði honum, at tað kundi fáa fylgjur fyri framtíðina hjá samgonguni, um hann legði uppskotið fram í sínum upprunaliga líki.

Jan Christiansen um atløgutrupulleikar hjá Norrønu:

# Tað verður lættari við tíðini

**Eg eri ógvuliga harmur um at hoyra skiparan á Norrønu finnast at atløguviðurskiftun um í Havn, nú eftir at vit hava brúkt einar 60 milliónir uppá at fyrireika havnarlagið til nýggja skipið, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri fyri Tórshavnar Kommunu. Hann væntar tó, at tað sum frá líður fer at ganga betur at leggja Norrønu at kei**

ATLØGA
*Rúnar Reistrup*

- Alt, sum vit hava gjørt á havnarlagnum fyri at fyrireika tað til nýggju Norrønu er gjørt í góðum neyvum samstarvi við Smyril Line. Tí er tað eitt sindur hugstoyttt nú at hoyra skiparan á Norrønu kalla tað eina skomm at bjóða Norrønu slíkar umstøður, sigur borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Jan Christiansen.

Í Sosialinum mikudagin kallaði skiparin á Norrønu, Ólavur Hovgarð, umstøðurnar at leggja Norrønu at í Havn út av lagi vánaligar. Skiparin segði, at havnalagið í Havn er rætt og slætt ov lítið, so umstøðurnar fóru aldrin at verða góðar, uttan mun til hvat verður gjørt.

## Í tráð við ynski hjá Smyril Line

- Um tað eru so álvarsligir trupulleikar at leggja Norrønu at í Havn, so er tað stórt spell, tí nú hava vit akkurát brúkt einar 60 millíónir uppá rampu, trapputorn og annað í sambandi við nýggju Norrønu, sigur Jan Christiansen.

Sambært borgarstjóranum í Havn hevur Smyril Line, ið eigur Norrønu, ongantíð ynskt annað enn at skipið skal leggja at í Havn.

- Smyril Line hevur allatíðina sagt, at tað ikki fór at verða nakar trupulleiki at fáa nýggja skipið at bryggju í Havn. Og eg gangi bara útfrá at teir hava tikið skiparan upp á ráð í hesum, sigur borgarstjórin.

Stjórin á Smyril Line, Óli Hammer, vil hvørki gera nakrar viðmerkingar til tað, sum skiparin á Norrønu hevur sagt, ella til nakað annað í sambandi við atløguviðurskiftini í Havn.

## Krevur venjing

Jan Christiansen sigur seg tó væl skilja, at skiparin á Norrønu kanska er eitt sindur ørkymlaður av at leggja Norrønu at í Havn.

- Skipið er stórt og fyllir nógv í havnalagnum. So tað kann ikki vera lætt at fáa skipið at kei. Tað tekur tíð, og har er ivaleyst stórt trýst á skiparanum. Tað ber tó væl til, eftir hvat eg havi skilt, men tað er sum við øllum øðrum, at tað krevur venjing. Tá gamla Norrøna kom, tók tað langa tíð at fáa hana inn at fyrstu tíðina. Tað sama var við Smyrli, tá hann kom, men nú verður hann lagdur at í eini handavending. Eg vænti, at sum frá líður fer at ganga betur og betur at leggja Norrønu at kei, og eg eri vísur í, at til tá hava øll forstáilsi fyri, at tað tekur upp í ein tíma at leggja at kei, sigur Jan Christiansen, sum sjálvur kom á Havnina við Norrønu mánamorgunin.